## UTTAN ÚR HEIMI

# Irak hevur samband við al-Qaeda

**Amerikanski verjumálaráðharrin, Donald Rumsfeld, vil vera við, at samband er millum stýrið í Irak og yvirgangsfelagsskapin al-Qaeda**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*

Rumsfeld kom við upplýsingunum á einum tíðindafundi í verjumálaráðnum Pentagon, og orð hansara styrktu hugsanina um, at USA heldur tað ikki vera nóg mikið at loysa ósemjuna við Irak við diplomatiskum átøkum.

– Tað er heilt týðiligt, svaraði Rumsfeld, tá ein tíðindamaður spurdi hann, um samband er millum Bagdad og al-Qaeda.

Hann vildi tó ikki leggja Irak undir at hava havt nakað við yvirgangsatsóknirnar tann 11. september í fjør at gera. Keldur í Hvítu Húsunum hava fyrr bent á, at irakska leiðslan hevði okkurt við atsóknirnar at gera, men amerikanararnir hava ongantíð prógvað, at tað var so.

Amerikanska fregnartænastan kannaði hesi viðurskifti seinasta heyst og kom tá til ta niðurstøðu, at tað ber ikki til at prógva, at Irak hevði nakað samband við atsóknirnar at World Trade Center og Pentagon. Í hesum sambandi varð eisini kannað, um Irak mundi hava samband við tey nógvu brøvini við miltbrandsporum, sum vóru í USA, men heldur ikki tað kundi prógvast.

Formaðurin í fregnartænastunevndini hjá senatinum, Bob Graham, hevur sagt, at myndugleikarnir hava eingi prógv fyri, at Irak hevur havt nakað við yvirgangin í USA at gera. Tað sama hevur formaðurin í fregnartænastunevndini hjá umboðsmannatinginum, Peter Gross, sagt.



*Donald Rumsfeld ivast ikki í, at samband er millum stýrið hjá Saddam Hussein og felagsskapin al-Qaeda*

# »Víkingakort« av Norðuramerika er teknað í síðstu øld

**Tveir bretskir granskarar siga seg hava prógvað, at eitt kort, sum higartil hevur verið roknað sum prógv fyri, at norðbúgvar komu til Amerika, er falskt**

0SØGA
*Árni Joensen*

Tað vakti stóran ans, tá tann viðurkendi lærdi háskúlin Yale fyri 37 árum síðani almannakunngjørdi avrit av einum landakorti av Norðuramerika. Sambært vísindastovninum var kortið teknað í 14. øld, og tað prógvaði, at norðbúgvar vóru í Amerika. Upprunakortið hevur síðani verið virðismett til 150 milliónir krónur.

Men nú siga tveir bretskir granskarar, at kortið er falskt. Robin Clark, sum er professari á University College í London, hevur saman við hjálparfólki sínum, Katherine Brown, kannað blekkið, sum kortið er teknað við. Undir kanningunum hava tey funnið evnið anatase, sum er eitt syntetiskt evni, sum fyrstu ferð varð nýtt til blekk í 1923.

Tey bæði vísindafólkini siga, at tann, sum hevur teknað kortið, hevur havt góðan kunnleika til tílíkt arbeiði, men at viðkomandi eisini hevur havt ávísan kunnleika til evnafrøði.

– Okkara kanningar prógva, at kortið er teknað aftan á 1923, skriva tey bæði vísindafólkini í einari grein í tíðarritinum Analytical Chemistry.

Søgufólk vísa á, at upprunin hjá kortinum hevur ikki so stóran týdning fyri ta søguligu uppfatanina og ástøðið um, at norðbúgvar komu til Norðuramerika. Tað er nóg mikið av øðrum prógvum, serliga fornfrøðiligum, sum vísa, at norðbúgvar komu til Amerika fleiri hundrað á undan Columbusi.

# Høgravongurin stóra framgongd í Noregi

**Flokkarnir á høgravonginum í Noregi fáa altsamt størri og størri undirtøku**

VELJARAKANNING
*Árni Joensen*

Sambært einari nýggjari veljarakanning hevði Framburðsflokkurin fingið 30,6 prosent av atkvøðunum, var val til Stórtingið í dag. Samstundis hevði Høgri fingið 18,1 prosent, so tilsamans høvdu teir báðir flokkarnir fingið 48,7 prosent av atkvøðunum og sostatt næstan meiriluta.

Men kanningin vísir, at var stórtingsval nú, hevði úrslitið givið teimum báðum flokkunum 84 tinglimir, og tað hevði verið nóg mikið til, at flokkarnir kundu skipa meirilutastjórn einsamallir.

Samanborið við næstseinastu kanningina er undirtøkan hjá Framburðsflokkinum vaksin 5,1 prosent, og verður kanningarúrslitið borið saman við valúrslitið í fjør, er undirtøkan meiri enn tvífaldað. Tá fekk flokkurin 14,6 prosent og nú 30,6 prosent.

# Mæla til at koyra fluor úr tannkremi

**Heilsumyndugleikarnir í Belgia seta nú forboð fyri, at fluor yvirhøvur verður nýtt í landinum. Samstundis mælir landið ES til at banna fluor í tannkremi**

HEILSA
*Árni Joensen*

Bannið fyri at nýta fluor í Belgia kemur í gildi í august, og landið er tað fyrsta, sum bannar fluortablettum og fluordropum.

Belgiski heilsumálaráðharrin, Magda Alvoet, segði í gjár, at kanningar hjá myndugleikunum hava víst, at fluor kann elva til beinbroyskni, og at fleiri kanningar benda á, at tað er ivasamt, um fluor hevur nakra gagnliga ávirkan á tenninar, tá fólk busta tenn við tannkremi, sum fluor er í.

Belgisku tannlæknarnir halda lítið um avgerðina hjá myndugleikunum, men kortini mælir belgiska stjórnin hinum ES-londunum til at taka somu stig.

Ein talsmaður hjá belgiska tannlæknafelagnum sigur, at avgerðin hjá Magdu Alvoet stríðir ímóti tilmælunum hjá heimsheilsustovninum WHO. Talsmaðurin legði afturat, at heilsumálaráðharrin kann ikki hava hugsað seg serliga væl um, áðrenn hon tók avgerð sína. Men Magda Alvoet sigur, at hon hevur álit á teimum vísindaligu kanningunum.



# LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.
tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

## Akfør

**Eykalutir**
Eykalutir til Mercedes 190, árg. '88-'92 til sølu.
*Tlf. 217778*

**Hyndai Elantra**
Ein hyndai Elantra, árg. '92. Hevur koyrt 118.700 km, til sølu fyri 20.000 kr.
*Tlf. 315613*

**Ford Sierra**
Ford Sierra, árg. '89 til sølu fyri 4.000 kr. Sportfelgur fylgja við.
*Tlf. 317362 ella 217362*

**VW Golf**
VW Golf, árg. '87 til sølu fyri 6.000 kr.
*Tlf. 316265*

**Ford Sierra**
Ford Sierra 2,0 - árg. '91 til sølu. Nýsýnaður, ongan kross. Sær gott út og er í góðum standi.
*Tlf. 373288 ella 254079*

**Ford Escort**
Ford Escort St.car 1,8 Diesel. Blámet. Árg. des. '95. Nýsýnaður og í góðum standi. Koyrt 77.000 km. Til sølu fyri 65.000 kr.
*Tlf. 216251*

**Kia Sephia**
Kia Sephia 1,5GTX sedan - árg. '97. Reyður. Hevur koyrt 56.000 km. El-rútar, el-spegl, powerstýring, sentrallás, píkadekk á felgum. Prísuppskot: 55.000 kr.
*Tlf. 332921 ella 223421*

**Renault Megane**
Renault Megane Coupe 1.6i frá '96. Hevur koyrt 133.000 km. CD-spælari og píkadekk á felgum fylgja við.
*Tlf. 441802*

**VW Polo**
VW Polo 1,4 - árg. '99. Hevur koyrt 45.000 km. Til sølu fyri 73.000 kr. 4 kavadekk fylgja við.
*Tlf. 421615*

**OPEL VECTRA**
3 ára gamal silvurgráur Opel Vectra Elegance 1.8 stationcar til sølu. Bilurin er sum spildur nýggjur og hevur einans koyrt 20.000 km. Hann er m.a. útgjørdur við aircondition, alu-felgum, fjarstýrdum centrallási, el-rútum framman, fløguspælara og tokulyktum. Nýggj vetrardekk á felgum og originalur bagaguberari fylgja við. Bíligari bilur í góðum standi verður møguliga tikin í býti.
*Tlf. 311996 ella 256494*

**ELLISAKFAR TIL SØLU**
Volvo Amazon árg. ´65 til sølu
*Tlf. 26 42 69*

**VW Golf**
VW Golf, árg. '89. Sýnaður des. 2001 í góðum standi og sær gott út. Nýlakeraður í jan. Til sølu fyri 15.000 kr.
*Tlf. 321229 ella 223360*

**Mazda 626**
Ein Mazda 626 2,0 - árg. '86. Hevur ongar plátur, men koyrir fínt. Heilt bíliga til sølu.
*Tlf. 332282 ella 253782*

**Sportfelgur**
4 næstan nýggjar sportfelgur við lítið brúktum dekkum 15" og 4 nógv brúktar sportfelgur, 14" eru til sølu. Passa m.a. til Nissan Primera.
*Tlf. 221434*

**Mazda 323**
Mazda 323 (sedan) árg. '88. Sýnaður í fjør. Til sølu fyri 16.000 kr.
*Tlf. 332185 ella 261985*

**Opel Ascona**
Opel Ascona 1,6 til sølu. Prísuppskot: 5.000 kr.
*Tlf. 255430*

**BMW 525TD**
Vìnreyður, nýsýnaður, til sølu um hòskandi boð fæst.
*Tlf. 373199/227293*

**BMW 525TD**
BMW 525TD, vínreyður, nýsýnaður. Til sølu um hóskandið boð fæst.
*Tlf. 373199 ella 227293*

**Peugeot 206**
Ein Peugeot 206, 110 hk, el-rútar, -spegl og hiti í setrinum. Koyrt 13.000 km til sølu fyri 135.000 kr. Størri bilur kann takast í býli.
*Tlf. 221434*

**TIL SØLU**
Peugot 405, árg. 89, til sølu. Bilurin sær gott út og koyrir væl.
*Tlf. 26 42 69*

**Hygg her!**
Ein sera vælhildin Renault Megane, árg. 12/'96. Vínreyður. Sær út sum nýggjur bæði uttan og innan. Sýnaður 12/'01. Selist vegna flyting til Danmarkar.
*Tlf. 283951*

**MERCEDES EYKALUTIR**
Til ein 190E árg, 89-90, aut. ynskjast frontdeilir til keyps, so sum forlyktir, blinklyktir, gittar, gittarramma, kúfangari, kølari, vifta.
*Tlf. 44 96 13 & 21 72 00*

**TIL SØLU**
Mitsubishi Lancer 1,8 Diesel, í góðum standi, til sølu fyri kr. 20.000.
*Tlf. 226022*

**Daihatsu Charade**
Daihatsu Charade G11, árg. '86. Er í góðum standi og nógvir eykalutir fylgja við. Til sølu fyri 8.000 kr. Hevur verið til sýn.
*Tlf. 332958 ella 260058*

**Til sølu**
Toyoyta Corolla 1,3; árg. '86. Góðkendur sýn mai 2002. Bíliga til sølu.
*Tlf. 318011*

**Ford Escort**
Ford Escort bíliga til sølu. Hann hevur plátur.
*Ring tlf. 223403 ella 310566*

**VOLVO 460**
Árg. 08/95 koyrt 81.000 km 4 píkadekk á felgum fylgja við. Prísuppskot 90.000.
*Tlf. 448352 ella 258352*

**Ford Scorpio**
Ford Scorpio 2,8i Ghia, árg. '85. Í sera góðum standi til sølu. Ein til eykadeilir fylgir við.
*Tlf. 442151 ella 256133*

**FORD ESCORT 1.8 TDI**
árg. 97, til sølu um hóskandi bo ðfæst. Hevur 17'' alufelgur, gáttir, hekkspoylara og instrumentpanelið er úr træi.
*Tlf. 228649*

**TOYOTA CAMRY**
Árg. 87, til sølu sum eykalutir.
*Tlf. 318238*

**TIL SØLU**
Citroën Saxo 1.5D til sølu, um hóskandi bo ðfæst. Árg. 97, koyrt 97.000 km, sýnaður í apr. 2002.
*Tlf. 254868*

**OPEL ASTRA 16i GLS**
Árg. 10/93, 128.000 km, sentrallás. Gev eitt boð!
*Tlf. 217846*

**NISSAN SUNNY 14 LX**
Frá 89, hevur koyrt 160000 km, og í sera góðum standi, til sølu fyri 30.000 kr.
*Tlf. 212223*

**Daihatsu Charade**
Daihatsu Charade G100, árg. '89. Nýsýnaður, í góðum standi til sølu fyri 10.000 kr.
*228347 ella 312515*

## Amboð

**Sproytukabina**
Sproytukabina, typa Blowtherm, til sølu.
*Tlf. (0045) 22438134*

**Rotorsláimaskina**
Rotorsláimaskina til sølu. Passar til allar traktorar. Slær 1,5 m breidd. Til sølu fyri 5.500 kr.
*Tlf. 451047*

**TIL SØLU**
Lítið brúktur blásarið á stativið sum gevur max 1300 l/min. Blivur drivin av eini ASEA elmotorið 3*380v -5,5kw. Vælegnaður til at turka hoyggj við. Prisur 5000,- kr.
*Tlf. 448302*

**Til sølu**
El-Flymo Gardenvac. uppsamlari til bløð av trøðum og annað avfall til sølu fyri 700 kr.
*Tlf. 441145*

**Til sølu**
El-Flymo sláðimaskina, 40cm br. til sølu fyri 800 kr.
*Tlf. 441145*

**TIL SØLU**
Ein miniGolf sláðimaskina 5 hk, dupultan knív 90 cm, til sølu fyri 10.000 kr., nýprísur 13.700,-. 1 ára gomul, onki brúkt.
*Telefon 221044 ella 455866*

## Arbeiði

**Venjarar!**
Øll, sum hava áhuga í at vera venjarar hjá Støkk komandi fimleikaár, eru vælkomin at ringja á tlf. 222447 áðrenn 9. august og hoyra nærri.
*Fimleikafelagið Støkk*

## Barnaansing

**DAGRØKTARMAMMA**
søkist til Jòrunn, 5 àr, ca.65% arb.tíð, sum skjòtast. Ring
*tlf.310753/004792629235 ( jessie)*

**BARNAANSING/HÚSHJÁLP**
Vit søkja eftir ungari gentu, sum kundi hugsað sær at arbeitt sum húshjálp i Danmark og passa tvey børn í aldrinum 6 og 9 ár. Byrja 1. september.
*Tlf. 0045 76968085*

**DAGRØKTARMAMMA**
søkist til Jòrunn 5 àr - 65% arb.tíð, skjótast!!Ring
004792629235/310753
*(spyr eftir Jessie )*

## Barnaútgerð

**Babylift**
Lítið brúkt babylift, myrkablá, til sølu fyri 800 kr. Bara brúkt til eitt barn.
*Tlf. 226090 ella 252351*

**Til sølu**
Bláur Brio koyristólur við galesju, regnslag og føroyskum skinnposa fyri 1.400 kr.
*Tlf. 317332*

**Chicco bilstólur**
Chicco bilstólur 9-18 kg til sølu fyri 800 kr. Nýprísur: 1.500 kr. Sær út sum nýggjur (myrkabláður við lítlum bamsum).
*Ring tlf. 321075*

**Til sølu**
Myrkabláur Brio barnavognur við puslitasku og lyft. Bert brúkt til eitt barn, til sølu fyri 1.800 kr.
*Tlf. 424224 ella 214224*

**Til sølu**
Barnastólur við galesju til sølu fyri 700 kr.
*Tlf. 455732*

**TIL SØLU**
3 ára gamal Brio barnavognur til sølu fyri 1000,- kr. Tilhoyrandi babylift og regnskjól fylgja við.
*Tel. 312004*

**Til sølu**
1 leður-look grá babylift: 300 kr.1 stativ v/ baðikar: 300 kr.
*Tlf. 421142*

**Til sølu**
Myrkablá, babylift og myrkablátt systkinasetur bíliga til sølu. Selist samlað ella hvør sær.
*Tlf. 212499*

**Ynskist**
Er tað nakar, ið kann selja mær eitt eldri model av Brio? (frá uml. 1990).
*Vinarliga ringi 318024*

**Barnavognur til sølu**
Ein grønur Silver Cross barnavognur við madrassu, kurv og flugunetið til sølu fyri 2.000 kr. (nýprísur: 5.200 kr.).
*319888 ella 253273*

**Til sølu**
Myrkabláur Odder barnavognur í góðum standi til sølu fyri 1.500 kr.
*319549*

**TIL SØLU**
Bláur Brio barnavognur v/ babylift, í góðum standi, til slu fyri 1.000 kr.
*Tlf. 318701*

**TIL SØLU**
Simo barnavognur v/ madrassu og lufthjólum, 1.600 kr. Brio koyristólur v/ galesju og posa, 1.200 kr.
*Tlf. 311263*

**HYGG HER!**
Høgur barnastólur, 200 kr. Hvít leður babylift, 350 kr. Baby Björn beriseli, 350 kr. Klappstólur, 100 kr. Spælibilur, 200 kr. træhillar, 100 kr. stk.
*Tlf. 313858 ella 215858*

**KOYRISTÓLUR**
Ein grønur Odder koyristólur v/ galesju til sølu fyri 1.100 kr.
*Tlf. 312192 ella 254620*

## Bátaútgerð

**10-mannafar**
10-mannafar, 26 fót, til sølu um nóg høgt boð fæst. Báturin hevur fiskiloyvi.
*Tlf. 327101 ella 327016*

**Kølivatnspumpa ynskist**
Kølivatnspumpa ynskist til keyps. Merki: Sole Mersetes 36-42 HK.
*Tlf. 456422*

**TIL SØLU**
Um hóskandi boð fæst, verður ein 27 fót „Myra" glastrevja bátur seldur. Báturin ið hevur ein MD40 Volvo Penta 6 Syl. 95 hk., er væl útgjørdur við: 4 automatiskum El snellum, hydraulisum línuspæli, radara, ekkuloddi, kortplottara ,sjálvstýrara og gummi bjargingarbáti.
*Tlf. 214246*

**Aluminium fiskakassar**
4 aluminium fiskakassar á 500 kg. stk. til sølu fyri 3.000 kr. stk.
*Tlf. 444314, best eftir kl. 18.00*

**Ekkolodd**
Brúkt litekkolodd t.d. Fuso 50 kHz ynskit til keyps.
*Tlf. 222102*

**8-mannafar til sølu**
Í góðum standi, hevur fiskiloyvi, er klárur til fiskiskap.
*Tlf. 444079 ella 212405*

**Ein Skanti 3000**
VHF til sølu. Fleiri eyka horn kunnu setast til. Er sum spildurnýggjur - ongantíð settur upp - selist fyri 3.800 kr.
*332888*

## Bingo

**Tvøroyrar Klubbi**
Tvøroyrar Klubbi hevur bingo leygarkvøldið 3. aug. kl. 20.00. Størra eykaspælið endar.
*Nevndin*

**Bingo í Framtíðini**
Bingo verður í Framtíðini sunnudagin 4. aug. 2002 kl. 16.00. Drigið verður millum spølini. Eykaspæl verður.
*Jóns víkingar*

**Bingo**
Gott bingo verður í TB-húsinum: Tórsdagin 1. august kl. 19.00. Høvuðsvinningur 2 x 500 kr. Hvørt bingo 300 kr. Eykaspæl verður eisini.
*Tvøroyrar Bóltfelag*

## Bøkur

**Bøkur**
Vit taka ímóti bókum.
*Tlf. 319630, Reyði Krossur Føroyar*

**Til sølu**
»Samtaler over Luthers lille katekismus«, Meyers forlag 1891, 200 kr.
*Tlf. 321915 ella 220660*

**Til sølu**
»Odhams Wem Atlas of the world«, 150 kr.
*Tlf. 321915 ella 220660*

**Til sølu**
Jul Schovelin: »Købmandens handbog«, 1916, 150 kr.
*Tlf. 321915 ella 220660*

**Til sølu**
W. L. Emmersson: »På vandring med mesteren«, 1+2, 150 kr.
*Tlf. 321915 ella 220660*

**Til sølu**
Lis Thorbjørnson: »Hvad hænder skabte«, 1964, 300 kr.
*Tlf. 321915 ella 220660*

**Til sølu**
Harald W. Møller: »Leksikon årbogen 1958«, 250 kr.
*Tlf. 321915 ella 220660*

**Til sølu**
Thv. Kristensen: »Evigheden banker på«, 30 kr.
*Tlf. 321915 ella 220660*

## Brævaskifti

**Ungarn kallar!**
Eg eri ein 57 ára gomul kvinna við stórum áhuga í øllum føroyskum - søgu, landalæru, mentan o.ø. Ynski brævasamband við onkran úr Føroyum. Hevur hetta tín áhuga, skriva so (á enskum) til:Manulek ZsuzsaJókai u.3.2211 VasadHungary
*e-mail: manulek@freemail.hu*

## Lýsingartekstur

____________________

Lýsingin ynskist: [1] [2] [3] [4] [5] ferðir
*(set X)* undir teiginum:

| | | |
|---|---|---|
| ❑ Akfør | ❑ Amboð | ❑ Arbeiði |
| ❑ Barnaansing | ❑ Barnaútgerð | ❑ Bátaútgerð |
| ❑ Bingo | ❑ Brævaskifti | ❑ Burturm./funnið |
| ❑ Býli | ❑ Bøkur | ❑ Dansur |
| ❑ Dýr | ❑ Fundir | ❑ Húsarhaldstól |
| ❑ Innbúgv | ❑ Lutaseðlar | ❑ Leikur |
| ❑ Matur | ❑ Pløgg | ❑ Samband |
| ❑ Súklur | ❑ Teldur | ❑ Tónleikur |
| ❑ Út-& sjónvarp | ❑ Ymiskt | ❑ ........................ |

***Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.***

Sent hevur:
Navn:……………………………………….
Bústaður:…………………………………….
Bygd/býur:………………………………….
Tlf.: ………....

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki